# Keisarin og leigudrápsmaðurin Jing Ke ci qin wang

DR1 jóladag kl. 23.35





Í ár 221 fyri Kristi føðing er Kina samansett av sjey sjálvstøðugum kongaríkum. Ying Zheng av Qin hevur sett sær fyri, at hann skal leggja tey øll saman um eitt stórveldi.

Sum søgan sigur, so eydnaðist hetta honum eisini, tá hann at enda bygdi Kinverska múrin at verja ríki sítt, men somikið langt gongur søgan tó ikki í hesum filminum.

Tá Ying Zheng leggur ætlanir sínar alment fram, møta hesar stórari mótstøðu. Fleiri eru, sum síggja sær ein møguleika fyri egnan vinning í hesum.

Ein er tó, sum vil hjálpa konginum í hesum. Frú Zhao setir sær nevnliga fyri, at hon skal leiga ein drápsmann at taka lívið av konginum. Ætlanin er eisini, at hetta skal miseydnast, so hinir kongarnir síggja, at Ying Zheng bert vil tað besta fyri samlaða ríkið.

Tað tekur nakað av tí, áðrenn Zhao fær yvirtalað leigudrápsmannin til hetta, og tá hetta loksins er eydnast henni, er alt broytt. Kongurin hevur nú givið ordrar til hópmorð kring alt ríkið, so nú er brádliga alneyðugt, at ætlanin um kongsmorðið skal eydnast.

# Dragonheart

Kanal 5 30. desember kl. 18.00





Bowen hoyrir til ein gamlan riddaraordan. Hann hevur í longri tíð tænt einum óndum kongi, har hann hevur vant krúnprinsin, Einon. Tá óndi kongurin doyr, verður Einon eisini særdur, men tað finst ein háttur at bjarga lívi hansara. Saman við drotningini fer Bowen til ein gamlan dreka, sum skal lata helvtina av sínum hjarta til prinsin.

Hetta eydnast, men tá Einon kemur til valdið, vísir tað seg skjótt, at hann ikki er pettið frægari enn pápin. Í síni neyð fer Bowen nú á eina sanna riddaraferð, har hann roynir at bøta um skaðan. Skjótt hevur hann dripið allar heimsins drekar - uttan ein.

Móti Draco gerst talan nevnliga um javnleik, og so gera teir báðir av at fara í parti við hvørjum øðrum. Hetta so at Bowen fær stórar gávur, fyri at »drepa« ónda drekan.

Landið líður tó framvegis undir ónda konginum, og at enda gera Bowen og Draco av, at nú kann vera nóg mikið.